

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 05 - 2012

# Kinesiski Føroya-pallurin staðið sveinaroyndina

Kinesiski boripallurin, sum í summar skal bora dýrasta og djúpasta brunnin á føroyska landgrunninum nakrantíð, Cosl Pioneer, hevur eftir øllum at døma staðið sveinaroyndina og væl tað. Hetta er niðurstøðan eftir, at pallurin nú hevur verið til arbeiðis í Norðsjónum fyri Statoil í skjótt 10 mánaðir. Hjá Statoil, sum hevur leigað pallin, eru tey somikið væl nøgd við henda nýggja kinesiska boripallin, tann fyrsti av sínum slag, at avtala er gjørd um, at hann skal bora fyri Statoil í hvussu er fram til august í 2014. Hetta skrivar offshore.no. Fyrisitingarstjórin hjá Cosl Drilling Europe, Jørgen Arnesen fegnast um, at Statoil hevur gjørt av at brúka ta fyrru av tveimum 2 ára optiónum at leiga pallin. Cosl Pioneer hevur havt eina sera góða, trygga og effektiva byrjan, síðani pallurin fór undir at arbeiða fyri Statoil í august 2011. At Statoil nú ger brúk av optión at leiga pallin víðari er ein staðfesting av, at pallurin hevur livað upp til vónirnar, sigur Jørgen Arnesen. Fyri Føroyar hevur tað eisini stóran týdning at vita, at pallurin, sum skal bora tann so týðandi Brugdan 2 brunnin í summar, hevur roynst væl hetta fyrsta árið. Talan er jú um tann fyrsta pallin av hesum slag bygdur í Kina, ið skal undir fyrstu veruliga stóru boriuppgávu sína, og hon verður í føroyskum sjógvi. Roknað verður við at kinesiski, ja lat okkum bara kalla hann Føroya-pallurin setir kós móti føroyska landgrunninum um einar tveir mánaðir ella so.

